# TAÐ HENDIR ...

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein



## VINN PENGAR ÚR LUFT

LeGutt skipar vegna Uttanríkisráðið fyri ráðstevnu undir heitinum: "Vinn pening úr luft" á Hotel Føroyum. Endamálið við ráðstevnuni er at geva fyritøkum, feløgum, stovnum og øðrum íblástur og amboð til at fáa mest møguligt burturúr tiltøkum við millum annað at professiónalisera tiltøk og marknaðarføra føroysk tiltøk uttanlands.

**Vinn pengar úr luft**
Hotel Føroyar í Havn
Týsdagin 26/10 kl. 8.00

## KRISTIN LEIÐARA-RÁÐSTEVNA




Um vikuskiftið verður ráðstevnan Global Leadership Summit hildin í Norðurlandahúsinum í Havn. Fyrireikararnir siga, at "ráðstevnan er eitt eggjandi og kveikjandi amboð hjá seriøsum sinnaðum kristnum í hesi heimsumfatandi leiðslurørslu, har leiðarar, umboðandi eitt undrunarvert fjølbroytni av fólkasløgum, etniskum bólkum, ymsum tungumálum og trúarbólkum koma saman at yvirgeva seg til at loysa og endurbyggja hendan falna heimin."

**Global Leadership Summit**
Norðurlandahúsið
Fríggjadagin 22/10-Leygardagin 23/10

## MEDINA SIGUR FRÁ

Eitt tað størsta poppnavnið í donskum tónleiki í løtuni er Medina, sum eisini vinnur fram uttan fyri Danmark. Í hesari bókini greiðir Medina frá sínum gjøgnumbroti og hendingaríka lívið. Hon hevur tosað inn á diktafon, tá hon hevur verið á ferð, og út frá hennara frásagnum er bókin skrivað.



**Medina – Tæt på**
Forlaget Turbulenz




## MEIRA ÓHUGNI

Annar filmurin um Paranormal Activity verður nú frumsýndur í biografum kring heimin. Hesaferð verður fylgt við eini familju, sum hevur havt innbrot. Maðurin setir upp vakmyndatól, men tað staðfestir bara, at umstøðurnar eru meira óhugnaligar, enn familjan hevði givið sær fær um.

**Paranormal Acitivity 2**
Biograffilmur
Hósdagin 21/10-



## STERKIR MÁLNINGAR FRÁ EYÐUNI

Í dag letur upp listaframsýning við Eyðuni av Reyni. Hann fer næstu tvær vikurnar at sýna fram í Galerie Focus í Havn. Málningarnir hjá Eyðun av Reyni eru sjálvstøðugir og sterkir. Hann er trúgvur mótvegis myndevninum og tí landslagi, ið tykist at vera ein ótømandi kelda fyri hann.

**Eyðun av Reyni**
Galerie Focus í Havn
Frá fríggjadagin 22/10 kl. 16.00-



## PÓL OG ANNETTE Í LÍTLUVÍK

Næstu dagarnar sýna Pól Skarðenni og Annetta Falk Lund verk fram í Smiðjuni í Lítluvík. Pól Skarðenni er búsitandi í Vatnsoyrum, meðan Annetta er ættað úr Týsklandi, men búsitandi í Danmark.

**Pól Skarðenni og Annette Falk Lund**
Smiðjan í Lítluvík
Frá fríggjadegnum 22/10 kl. 14.00

## MENTANARVIKA Í RUNAVÍK

Í sambandi við Faroe Expo ráðstevnuna verður skipað fyri nógvum mentanartiltøkum í Runavík og har á leið. Mentanarvikan bjóðar alt frá listaframsýningum, tónleiki og myndafrásagnum til sang workshop, syngið-við og filmsfestival. Skráin fyri Mentanarvikuna í Runavík er at finna á faroexpo.fo

**Mentanarvika í Runavík**
24/10-31/10

